# Kjak



Kitty May Ellefsen

## Okurs útreiðslur ein hóttan fyri vælferðina í Føroyum

*Eins og danir so mugu vit eisini byrja at rationalisera*

Nei, tað er eingin løtt loysn – men tíðin er komin til at hyggja føroyska samfelagið í kortini og rationalisera.

Løkke og Thorning vóru, ígjárkvøldið bæði samd um at okkurt má gerast við øktu útreiðslurnar at reka danska samfelagið. Bæði vóru tey samd um at rationalisera og spara, so danir ikki bara fáa eina bíligari men eisini eina betri almenna umsiting. Hetta er alneyðugt fyri at tryggja donsku vælferðina, sum er hótt av øktum almennum útreiðslum.

### Í Føroyum

Í Føroyum standa vit í somu støðu sum danir. Útreiðslurnar at reka landið eru nógv vaksnar seinastu 10 árini. Hyggja vit eftir høvuðstølunum hjá landskassaroknskapinum, vóru inntøkurnar hjá landinum 3.767 mió. kr. í ár 2000, meðan útreiðslurnar vóru 3.166 mió. kr. Tað vil siga at húsarhaldið Føroyar tá hevði eitt yvirskot áljóðandi 601 mió. kr. í ár 2000.

Síðani ár 2000 vaksa útreiðslurnar skjótt ár undan árið. Inntøkurnar vaksa eisini, men tær megna ikki at vaksa eins nógv og útreiðslurnar. Inntøkurnar í 2009 vórðu 4.535 mió. kr., meðan útreiðslurnar eru vaksnar til 5.223 mió. kr. Undirskotið hjá landskassanum var sostatt í 2009 688 mió. kr.

### Útreiðslurnar vaksa og eingin er glaður

Sjálvt um útreiðslurnar eru øktar munandi síðan ár 2000, og hetta skuldi havt við sær, at almenna umsitingin er vorðin tilsvarandi betur, so hava vit ongantíð fyrr hoyrt so nógv ónøgdsemi um manglandi pengar sum nú. Vit hoyra dag og dagliga í fjølmiðlunum, at stovnsleiðarar gremja seg um manglandi játtan og at føroyskir borgarar eru misnøgdir við almennu tænasturnar.

### Tað er eingn løtt loysn – men vit mugu rationalisera

Nei, tað er eingin nem loysn – men tíðin er komin til at hyggja føroyska samfelagið í kortini og rationalisera.

Í einum so lítlum landi sum Føroyar eiga vit at ansa væl eftir, at fyrisitingin virkar effektiv, smidlig og tænastuvinarlig. Samstundis sum hon er tilpassað tey umleið 50.000 fólkini, ið búgva í Føroyum.

Tá talan er um rationaliseringar og sparingar eigur at verða byrja úr erva. Tildømis havi eg víst á, at aðalráðini verða minkað úr 9 til 6 aðalráð. Hetta hevði bara betra um bæði fyrisitingina sjálva og fakliga umhvørvið hjá fyrisitingini. Verða aðalráðini løgd saman, verður tað nógv lættari at fáa samskipað ella leggja stovnar saman við effektivieringum/sparingum fyri eyga.

Lat okkum ikki sita hendur í favn – men lat okkum fara ígongd áðrenn danir aftur gera tað fyri okkum.



Jóhan Christiansen
*borgarstjóri*

## Greitt ábyrgdarbýti á eldraøkinum, púra samdur

Í fjølmiðlunum nú um dagarnar, kunna vit lesa, at Jóhan Heri Joensen heldur at vit politikkara í Eysturoy tosa við tveimum tungum, tá tað verður mótmælt at Rósa Samuelsen, Landsstýriskvinna, ætlar at niðurleggja umlættingsplássini á Gøtubrá. Fyri at nýta hansara orð, so heldur hann hetta vera "*politiskt skemt á høgum støði*". Hetta førir hann fram, uttan so mikið sum um at hava sett seg inn í málið. Tað harmar meg.

Lat okkum taka tað frá einum enda. Gøtu- og Leirvíkar kommunur tóku tey stóru stig, og bygdu eldrasambýlir. Hetta vóru íløgur fyri uml. 35. mió. kr harav stuðulin frá landinum var 1.3 mió. kr. Eisini hava kommunurnar báðar, og nú Eysturkommuna eisini, verið við at bygd og útbygd Eysturoyar Ellis- og Røktarheim.

Umframt tað, so hava kommunurnar goldið fyri rakstur og náttarvaktirnar á sambýlunum. Árliga nettoútreiðslan av hesum er knappar 2. mió. kr. ella 1.000,- kr. pr. borgara í Eysturkommunu.

Tá sambýlini vóru bygd, var ikki tørvur á 26 sambýlisplássum í Gøtu og Leirvík, men Eysturoyar Røktar- og Ellisheim (ERE) manglaði umlættingarpláss, og tí blivu 6 pláss bygd afturat í sambýlinum í Gøtu, og plássini blivu leigaði út til ERE. Støðan er ikki broytt í dag. Enn er tørvur á røktarheimsplássum og ikki sambýlisplássum. Tí undrar tað okkum, at man nú skal niðurleggja røktarheimspláss og uppræætta nýggj sambýlispláss við tí grundgeving, at tað er betri fyri borgaran. Niðurleggingin hevur einans eitt endamál, nevnuliga at spara landinum pengar. Og tað kann man so hava sínar meiningar um.

Eysturkommuna hevur greitt boða frá, at hon góðtekur ikki at landið flytir fleiri útreiðslur frá landinum til kommununa, og hevur tískil boða frá, at hon ikki er sinnað at rinda fyri nýggj sambýlispláss. Tískil verður niðurleggingin av hesum plássum verðuleiki, og Rósa Samuelsen sparir nakrar krónir.

Greitt ábyrgdarbýti er nakað sum kommunurnar leingi hava eftirlýst. Tískil hevur Eysturkommuna eisini bjóða Almannaráðnum/Nærverkinum at umleggja alt Gøtubrá til eitt Røktarheim. Á tann hátt vildi Jóhan Heri Joensen eisini fingið sín vilja, nevnuliga við einum ellisheimið í Eysturoy afturat.

Samstundis vildi Eysturkommuna komi niður á áleið sama kostnaðarstøði til eldraøkið, sum hinar kommunurnar í landinum hava í dag.

Lat okkum venda myndini eitt sindur. Kommunurnar hava ábyrgd av barnaøkinum, og sum sagt, ikki av eldraøkinum. Bleiv Gøtubrá umlagt til eitt ellisheim, so vildi kostnaðurin Eysturkommuna rindar til eldraøkið lækka við uml. 1. mió. kr árliga, ella niður á uml. 500,- kr. pr. borgara, ið allíkavæl er væl hægri enn t.d. tað sum Fuglafjarðar kommuna rindar.

1 mió. kr. á eldraøkinum svarar til 2.000,- kr. í barnafrádrátti. Í staðin fyri at kommunan var noydd at lækka barnafrádráttin við 1.000,- kr í 2011, kundi hon hækka hann við 2.000,- kr. Kundi eisini víst á, at tað eru kommunur, ið rinda millum lítið og onki til eldraøkið í dag. Var Eysturkommuna ein av teimum, so kundu vit hækka barnafrádráttin við 4.000,- kr. og ikki lækka hann fyri 2011.

Í staðin fyri rindar kommunan knappar 2 mió. kr. til eitt málsøkið, ið ikki eru kommunalt, men lands. Orsøkin til hesa útreiðsluna, kennir Jóhan Heri Joensen, sum hevur tikið sær av eldraøkinum í sínum lokaløkið í mong ár, betri enn undirritaði.

Lat ongan misskilja okkum. Eysturkommuna er stolt av og glað fyri tey megnar tøk Gøtu- og Leirvíkar kommunur hava gjørt. Tað var neyðugt, tí landið røkti ikki sínar skyldur, og tey gomlu sum hava bygd hetta samfelagið upp, lógu óhjálpin og einsamøll heima, uttan tað røkt teimum er uppiborði.

Tað Eysturkommuna mótmælir er, at okkara skattaborgara skulu áleggjast fleiri útreiðslur til eldraøkið, enn man longu hevur í dag. Og tær útreiðslur skattaborgarin í Eysturkommunu hevur í dag á eldraøkinum, eru millum tvær og fýra ferð størri, enn flestu aðrar kommunur hava. Skal ein umlegging frá røktarheimsplássum til sambýlispláss fara fram, so eigur hon at vera gjørd har tað ikki longu verður rinda í so stóran mun til eldraøkið, sum tað verða í Eysturkommunu. Men rættast er uttan iva, at landið tóks sær fult og heilt av teimum uppgávum, ið tey varða av. Her millum eisini eldraøkinum. Greitt ábyrgdarbýtið!!!